# ítróttur

Nr. 251 • fríggjadagur • 31. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


## Vinningurin fór til neyðhjálp

Ein partur av vinninginum, sum kvinnulandsliðið í hondbólti fekk, var ein kekkur áljóðandi 2.500 kr. Og tað var skjótt, at avgerð varð tikin um, hvat hesin skal nýtast til. Kvinnulandsliðið hevur saman við HSF gjørt av, at upphæddin verður latin Reyða Krossi, sum í hesum døgum savnar pening inn til neyðhjálparpararbeiði í Suðurasia.

-jm

# Kvinnulandsliðið varð ársins

**Fjølmiðlafólk innan føroyska ítróttarheimin vóru mest sum púra samd, tá ársins ítróttarnavn skuldi kjósast**

ÁRSINS ÍTRÓTTARAVRIK

*Jákup Mørk*

Hetta er tíðin, tá ársins avrik av ymsum slag verða kosin. Summi eru helst meira fegin um heiðurin enn onnur, og mikudagin kom so enn eitt navn í røðina av teimum, sum nú kunnu rópa seg fyri best í árinum.



*Fremstu ítróttarfólkini í landinum her avmyndað úti á Føroya Bjór, sum læt vinningarnar. Frá vinstru eru tað Rúni Weihe; Svein Rógvi Nielsen og Gunnleyg Berg fyri kvinnulandsliðið og Bárður Johannesen og Rúni Nolsøe fyri HB*

*Mynd: Terji Nielsen*

### Sannførandi vinnari

Sum nakað nýtt hevur Sosialurin í ár tikið stig til, at ársins ítróttarnavn skal kjósast. Hetta verður gjørt soleiðis, at tey fjølmiðlafólk, sum dagliga fáast við ítróttartilfar, eru sloppin at siga sína hugsan um, hvat av ítróttaravrikunum tey hava hildið verið tað besta í árinum.

Og tá talt varð saman, var úrslitið sannførandi. Kvinnulandsliðið í hondbólti, sum í vár tók lut í Challenge-Trophy kappingini í Mezzocorona í Italia, fekk so nógv tær flestu atkvøðurnar.

Tilsamans vóru tað 11 fjølmiðlafólk, sum skuldu greiða atkvøðu. Hvør teirra skuldi seta fimm nøvn á ein lista, har fremsta navnið fekk fimm stig, næstfremsta fýra o.s.fr.

Av teimum 55 atkvøðunum, sum tað soleiðis var gjørligt at fáa, fekk Kvinnulandsliðið í hondbólti ikki færri enn 44, og so var eitt stórt glopp niður til næstu nøvnini.

### Fingu gongd á

At gera ein fullfíggjaðan samandrátt av ferðini hjá kvinnulandsliðnum til Italia, verður helst av rúgvusmikið í hesum umfarinum.

Men tað kann staðfestast, at talan var um eina ferð, sum veruliga fekk føroyingar at varnast, at kvinnuhondbólturin eisini hevur eitt landslið uppiborið. Arbeiðið kring hetta hevur fyri tað mesta ligið stilt ígjøgnum longri tíð. Fyri einum trimum árum síðani varð tó ein roynd gjørd at fáa gongd á arbeiðið aftur, men av ymsum ávum steðgaði hetta at kalla upp, eftir at liðið fyrst hevði leikt tveir EM-undankappingardystir móti sterku svensku kvinnunum.

Seinasta vetur varð so avgerð tikin um, at nú skuldi gongd á aftur. Heldur enn at taka lut í undankapping, varð liðið teknað til Challenge-Trophy kappingina, sum er ein kapping fyri smærri hondbóltstjóðir. Flemming Raben og Svein Rógvi Nielsen vórðu settir sum venjarar, og teir royndu at leggja nógv fyri. Venjingarnar undan ferðini vóru nógvar í tali, og seinast í apríl mánaði varð kósin so sett móti Italia.

### Fantastisk avrik

Her visti helst eingin, hvat var í væntu, men kvinnurnar fóru undir uppgávuna við góðum treysti. Og eftir fyrsta sigurin á Belgia, tóktist ferð veruliga at koma á. Móti Ísrael gjørdist talan um ein tepran eittmáls sigur, og heima í Føroyum sat øll tjóðin sum á glóðum, tá Hilmar Jan Hansen sum ein annar italiumaður geylaði um fantastiska føroyska stríðsviljan.

Seinasta dystin í bólkaspælinum høvdu okkara einki at spæla fyri, og tí gjørdi tað minni, at Letland vann ein lættan sigur her. So varð hálvfinalan øðrvísi. Har hittu okkara Finnland, sum av mongum varð mett sum næst sterkasta liðið í kappingini. Men tað slapp ikki at standa ósvarað. Tvær ferðir skuldi umdystur til, og tá Finnland í seinastu sekundunum av sætta hálvleikinum brendi brotskast, stóð tað greitt, at lítlu Føroyar høvdu vunnið seg til finaluna.

Her gjørdist so talan um greitt tap móti sterka Italia, men tað skalaði ikki fatanina av føroysku heildaravrikinum. Kvinnur okkara vunnu mongu hjørtu millum hinar luttakararnar í Mezzocorona, og ikki minst, so vunnu tær sær eisini pláss millum allar føroyingar.

# Klaksvíkingur til Chelsea

**Í januar mánaði fer 16 ára gamli Kristoffur Jacobsen úr KÍ til enska Chelsea**

FÓTBÓLTSÆVINTÝR

*Jákup Mørk*

Tað er uttan iva ein partur av dreingjadreyminum hjá unga klaksvíkinginum, sum við hesum rennur út, men enn er so ikki talan um nakran veruligan sáttmála.

Á heimasíðu sínari boðar KÍ frá, at hetta millum annað er úrslit av vitjanini hjá Andy Williams í summar. Hesin er ungdómsvenjari hjá Liverpool, og umvegis hann hava teir í Chelsea so fingið eyguni upp fyri, at onkur evnaríkur fótbóltsleikari møguliga er at finna í Klaksvík.

– Nýggi ungdómsvenjarin hjá Chelsea, Lee Congerton, sum hevur til høvuðsuppgávu at finna nýggjar ungdómsspælarar til felagið, roynir at eisini at finna spælarar í onkrum nýggjum øki, og umvegis Andy Williams er hann komin á slóðina av KÍ.

– Chelsea sóknast eftir einum spælari í ávísum aldri, og KÍ hevur gjørt av at senda Kristoffur Jakobsen avstað til royndarvenjingina. Kristoffur er ein av lovandi ungu spælaranum í KÍ, og hann hevur spælt á ungdómsliðum hjá FSF. Hann hevur í vetur gjørt sáttmála við KÍ. Kristoffur skal venja í Chelsea í eina viku, og hann fær eisini møguleikan at vera við í einum dysti hjá U18 hjá enska felagnum, verður sagt á heimasíðuni hjá KÍ.

So í tíðarskeiðinum frá 9. til 15. januar sleppur Kristoffur at royna seg millum so mætar leikarar sum Frank Lampard, Joe Cole, Eidur Smári Gudjohnsson, Didier Drogba, van Robben og Duff fyri bara at nevna nøkur av nøvnunum í stjørnusetta Chelsea.